**Dimmalætting**

Stovnað 1878
*Ábyrgdarbladstjóri:* Beate L. Samuelsen
*Bladstjóri:* Georg L. Petersen
*Útgevari:* P/F Dimmalætting
*Prent:* Dimmalætting

AVGREIÐSLA: Mánad. til hósd. kl. 8.00-17.00. Friggjad. kl. 8.00-16.00. Leygard. stongt. Tlf.-avgreiðsla kl. 8.00-16.00. Tlf. 311212. Fax: 310941. Smyrilsvegur 13, Postboks 19, FO-110 Tórshavn.
*e-mail:* redaktion@dimma.fo, prent@dimma.fo, lysing@dimma.fo, haldari@dimma.fo, bokhald@dimma.fo, kronikk@dimma.fo, vidskerin@dimma.fo


**INNLATINGARFREIST FYRI LÝSINGAR**

| | Týsdagsblaðið | Mikudagsblaðið | Hósdagsblaðið | Friggjadagsblaðið | Leyg.dagsblaðið |
|---|---|---|---|---|---|
| Størri lýsingar | fri. kl. 12 | mán. kl. 12 | týs. kl. 12 | mik. kl. 12 | hós. kl. 12 |
| 2 tg. tekstlýsingar | má. kl. 10 | týs. kl. 10 | mik. kl. 10 | hós. kl. 10 | fri. kl. 10 |
| Okkara Gulu | fri. kl. 15 | | týs. kl. 15 | | hós. kl. 15 |

Lýsingar, ið nogv arbeiði er av, mugu vera inni í góðari tíð.
Litlýsingar og lýsingar við framihjáplássi skulu bíleggjast í góðari tíð.

**Vanligar treytir:** Síðustødd: 8 teigar á 41x515 mm. 1/1 síða 4.160 mm. Útsjónd: Lýsingar, sum eftir bladsins meti kunnu mistakast fyri bladtilfar, skulu merkjast við orðinum: Lýsing, sum verður roknað uppi lýsingarmátið. Orðið INSERAT verður ikki góðtikið. Innlatingarfreist fyri lýsingar: Sæst á skemanum til vinstru.

**Fyrivarni:** Innihaldið í lýsingunum má ikki stríða móti galdandi løgum. Ábyrgdina fyri hesum hevur lýsarin. Blaðið tekur sær rætt til at sýta at taka lýsingar við, sum blaðið metir óynsktar.

Teknisk viðurskifti og umhugsan fyri lesarum og lýsarum ger, at blaðið má tilskila sær rætt til at:

1. gera smærri týdningarleysar broytingar í lýsingum hvat teksti og uppsetan viðvíkir.
2. skjóta út eina lýsing til seinni blað. Litlýsingar kunnu bert takast við, um tekniskú viðurskiftini loyva tað.

Endurgjald fyri møguligar villur, sum lýsarin sjálvur ikki hevur skyldina fyri, er vanliga prísavsláttur eftir bladsins meti um virðisminkan av lýsingini, men í mesta lagi at lýsingin, ella líknandi lýsing, verður tikin við aftur seinni ókeypis. Villur, sum standast av vánaligum lýsingartilfari hevur blaðið onga ábyrgd av.

Lýsingar, sum verða inntelefoneraðar, verða altíð lisnar uppaftur, og blaðið tekur tí onga ábyrgd fyri villur, sum koma á henda hátt.

# *Bíligu oljudroparnir ov dýrir*

MONG undrast á, hvussu politikarar skulu bjarga samfelag okkara í land eftir at álitið, sum vit í nøkur ár hava sett á oljuvinnuna, ikki júst er tað besta í hesum døgum.

Er føroyski oljupolitikkurin bert ein sápubløðra við oljudæmi, ella hvussu hongur hetta í veruleikanum saman!

Grannalond okkara, sum í fleiri ár hava havt inntøkur av oljuvinnuni í Atlantshavinum eru farin at aftra seg at gera meiri enn hægst neyðugt við hetta virksemi, sum er vorðið so dýrt at fáast við, av tí oljan á havinum liggur so óhøgliga fyri, at tað meiri snýr seg um at seta pening til enn at fáa vinning úr henni í teim økjum, har okkara vónir eru mettar at liggja fjaldar.

Áhugin hjá fremmandu oljufyritøkunum fyri okkum kann tykjast í so ullintur við hvørt. Tað kemst sjálvandi ikki av ongum.

At tær hava fingið fótafesti í landinum, eru vit takksom fyri, tí tað fer at smitta av á okkara búskap um so er, okkurt ítøkiligt kemur burturúr oljuvinnuni.

Sambært hørðu kappingina innan oljuvirksemi, vilja aðrar oljufyritøkur ikki standa aftanfyri ta fyrstu, sum kom her, og er tí skipað so fyri, at tær eru her, um tað skuldi hent, at onkur oljuroykur merktist, tá lotið lá inn móti landi!

Av somu orsøk eru føroyingar, sum hava fingið sær einhvørja útbúgving innan oljuvinnuna, tøkir og væl fyri, um so er, at oljuvinnan gerst veruleiki - ella eisini fyri betri at standa seg í røðini, tá oljufyritøkurnar søkja eftir fólki.

Eisini tað er at fegnast um.

Tá vit so hugsa um tær uppsøgnir, sum hava verið bæði innan oljuvinnuna í Skotlandi og í Noreg, er tað sum um ikki alt, ið hevur við eina oljuvinnu í Føroyum at gera, er so ljósareytt, sum vit hava hildið, at tað fór at verða.

At hoyra tíðindi um stórar og kendar oljufyritøkur, ið eisini eru umboðaðar í Føroyum, og sum nú eru farnar at skrúva niður fyri blussinum innan oljuvinnuna í Norðsjónum, fær okkum at hugsa, um vit ikki føra okkum fram sum ein í so trongskygd tjóð, har vit royna at skava útyvir veruleikan.

Sjálvandi eru eisini vit noydd at vera við, har nakað møguliga er í væntu okkum til fyrimunar í framtíðini, eftir sum vit ikki hava so nógvar aðrar møguleikar at lívbjarga okkum við annað enn fiskivinnuna.

Tað er ikki nakað nýtt.

Men við at hugsa um øll tey fólk innan vinnur, sum knýttar eru at oljuvinnuni í londunum fram við Norðsjónum, har fólk í hópatali í løtuni gerast arbeiðsleys vegna ov bíligan oljumarknaðarprís, er tað ikki tað mest spennandi fyri eitt komandi fullveldi, at inflatión er komin í, hvør hevur tað besta og tað mest brúkara vinarliga fullveldis-útsølutilboðið, samgongan ella Javnaðarflokkurin, meðan Sambandsflokkurin einsamallur ikki vil víka frá síni stevnuskrá og tí vil halda fast um ríkisfelagsskapin við Danmark.

At tað ikki kann betala seg at taka dýru oljudroparnar upp úr havsins botni í løtuni er veruleikin.

Tað eru hópuppsagnirnar av fólki innan oljuvinnuna besta prógv um.

Og tað er syrgiligt.

## Andlát

†

Vit kunngera fyri ætt og vinum, at góði maður mín, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

***Karl Johan Hansen***
av Glyvrum
ættaður úr Lamba

andaðist á Landssjúkrahúsinum 26. januar, 77 ára gamal.
Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum friggjakvøldið kl. 17.00 í Glyvra kirkju
Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13.00

*Kathrina og børnini*

## Tøkkir

Eina hjartans tøkk til tykkum øll, sum vístu okkara góðu

***Gunhild Marr Olsen***

tann heiður at møta í kapellinum, í Vesturkirkjuni og síðan fylgja henni á gravarbakkan. Hjartaliga takka vit sangarum, tykkum á Lágargarði og serliga starvsfólkunum í Handarustovu, sum vóru so góð við okkara kæru konu og móður. Tøkk til tykkum nógvu, sum rættu eina hjálpandi hond.

*Sofus, Ann og Sheila*

## Viðmerkingar

# Så kom turen til de unge

Efter landsstyrets afvisning af lønforbedring til deres egne ansatte – de offentlige ansatte – samt ingen forhøjelse af folkepensionen, er turen nu kommet til de unge mennesker, som ønsker at få en videregående uddannelse enten her eller på den anden side Nolsoy.

Vores vicelagmand har dog været så behjælpelig overfor de forældre og unge, som vel allerede nu skal til at udfylde ansøgningsskemaer til et eller andet uddannelsescenter, ved at foreslå, at forældrene IKKE bør sende deres børn til Danmark. Og det gør det jo straks lidt lettere at vælge.

Da jeg har forstået, at Høgni Hoydal selv har studeret i dette lille smukke land, kan det jo undre, at han selv netop valgte Danmark. Først var jeg så naiv at tro, at årsagen kunne være den, at han selv havde lært for lidt og derved spildt en masse tid af sin ungdom – men, nej, nej, begrundelsen for at de unge ikke bør søge til Danmark, er ifølge hans udtalelse til Sosialen kort før jul, at

1/ de studerende i Danmark får alt for stor økonomisk støtte –

2/ det kan ikke være meningen, at et land skal optræde som den omsorgsfulde moder, der skal sikre hver enkelt borger.

Hvis Høgni kan garantere en bedre uddannelse andre steder end i Danmark – og det er da slet ikke utænkeligt – er det da i orden, men vær venlig at anføre årsagen samt landets navn, så de unge mennesker har noget håndfast at begrunde deres valg på.

ad 1/ hvorfor kommer en sådan udtalelse EFTER, at Høgni selv er færdig med sine studier og efter at han selv har fyldt lommerne med, hvad han kunne skrabe til sig af gode færøske og danske kroner. Bryder han sig måske ikke om, at andre også burde nyde godt af denne økonomiske støtte.

ad 2/ jo, det da ved gud, det skal, idet det jo netop er en af grundpillerne i et demokratisk samfund, at alle skal have »chancen«, uanset om man måtte hedde von Gyldencrone, Hoydal eller måske »kun« Sørensen.

Iøvrigt er et »rigtigt« navn eller om forældrene har penge, vel ikke nødvendigvis en garanti for, at personen er mere evnerig end gennemsnittet. Ofte det modsatte.

De unge mennesker, som virkelig går op i deres uddannelse, til gavn for dem selv men så sandelig også for deres land, burde have MEGET mere i støtte, medens de, der blot tror, at deres studietid skal opfattes som en skatteyderbetalt ferie eller en politisk strikkeklub, hurtigst muligt burde sendes retur.

Ovenfor nævnte pkt 2/ beviser klart, at denne unge kometpolitiker desværre endnu ikke har erhvervet sig et socialt og demokratisk sindelag. Man fristes til at sige det på den måde, at han har været for lærenem nede på RUC i Roskilde!

Iøvrigt er det uforståeligt, hvorfor en landsstyresmand som Høgni Hoydal, der jo har sit eget ministerium at passe, altid skal blande sig i sine kollegers gøren og laden – har han ingen tillid til disse garvede kolleger? Hvorfor ikke lade partikollegaen Signar á Brúnni kommentere disse ovennævnte spørgsmål, som jo rettelig hører under hans gebet?

Og enten du kan lide det eller ej, hr. vicelagmand, så er både du og de unge færøske studerende »beskyttet« af den danske grundlov og har dermed samme rettigheder som grønlandske og danske studerende

**Aksel Krogh**
Tórshavn


**Dimmalætting**
*– góður lesnaður*
*– altíð við tí nýggjasta*
*– fer í næstan hvørt hús í Føroyum*



***Lýsingar til blaðið***
Um síðstu freist at lata inn lýsingar sæst ovast á síðu 2
**Dimmalætting**


# *Tillukku við barninum*



*Hvønn leygardag ynskir Dimmalætting foreldrum tillukku við lítla barninum, annaðhvørt bara í teksti ella í teksti og myndum. Hetta gera foreldrini sjálv av. Send brævbjálvan til Dimmalætting, postboks 19, 110 Tórshavn merkt »Tillukku við barninum«, skriva avsendara, navn og adressu, so vit kunnu senda myndina aftur sum skjótast. Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd í blaðið. Vit skulu hava myndirnar í seinasta lagi friggjamorgun. Um foreldrini ynskja tað, kann myndafólk frá blaðnum taka myndina ókeypis. Ring 311212, og vit avtala nærri.*

## Orðið

*Les Sálm 28*

**HVUSSU ER SONGUR TÍN?**

*... og eg skal prísa Honum við songi mínum. - Sálmur 28v7*

LERKAFUGLURIN syngur ikki í reiðrinum. Men lættir hann sær í loft fært tú at hoyra vakrasta song. Hægri hann fer, tess glaðari tónarnir; og tú hoyrir altíð, nær hann kemur niður aftur, tí fagnaðarlagið tá viknar so við og við. Og aftur í reiðrinum, heldur tónleikurin uppat.

Heldur ikki vit eiga nakran sigursong í hjartanum, byrgja vit hugsanir okkara inni í gamla, syndafulla náttúru-reiðrinum« ella lata okkum kúga av nívandi viðurskiftum. Sum vit hugsa um egnan veikleika og óndskap heimsins, kenna vit okkum yvirfloymd av mistreysti. Hinvegin – grunda vit á upphevjaðu støðuna í Kristusi og royna at nærkast Gudi, fáa vit at sanna, at Hann tá heldur seg nær okkum (Jákup 4,8). Tann lukka, ið sprettir úr hesum tætta samfelagi mergjar sálina. Tess meir vit líta á Hann, tess meir styrkjast vit í náði og andaligari fatan. Vit læra at samskifta við íbúgvandi Heilaga Andan og sannroynd, at gleðin í Harranum er styrki okkara (Neh. 8,10).

Latið okkum tí miðsavna ansin um Harran og alt, Hann ger fyri okkum, staðin fyri at søkka niður í grundan á egnan veikleika og ørkymlandi umstøður. Hann lyftir okkum upp um slíkt og opnar nýggjar sjónarringar.

Tá verða vit før fyri at »prísa navni Guds við songi« og »hálova Honum við tøkk« (Sálmur 69,31). © -prp-

## Brøv til Dimmalætting

# Tey vælbjargaðu í Føroyum

Tað er so nógv, sum kundi verið skipað øðrvísi, sluppu vit av við tey vælbjargaðu í Føroyum, sum liva av reindyrkaðari spekulatión og útnyttan av arbeiðarastættum.

Tað er, tá ið hesi ríka seg upp við at halda øðrum niðri í teirra valdsmisbrúki, tá ið tú hugsar um tey, ið eru fyri diskriminatión, forfylgjan, forfjónan, hóttan og kúgan.

Tað er uppá tíðina at øll tit, sum ikki eru umfatað av familju-, vinar og kenningarpolitikki úti á øllum arbeiðsmarknaðum kring landið vendu teimum bakið, ongantíð ov skjótt.

Tað er fyri, at tit øll somul skula sleppa undan framhaldandi at liva og virka sum trælir úti á arbeiðsmarknaðum sum ein hevur umrøtt í lesarabrøvum. Tað er eisini við at greiða familjum, vinum og kenningum frá, hvussu tit verða diskrimineraðir, forfylgd, forfjónað, hótt og kúgað av vælbjargaðum, ið eru kriminellir lógloysingar.

Tað er, tá ið tann ríkni familju-, vinar og kenningar, politikkur er brot á grundlógartryggjað frælsi, manna- og javnstøðurættindir, ið ein áður hevur nevnt í lesarabrøvum.

Tað er ein avleiðing av hesum ríkna familju-, vinar og kenningarpolitikki, at vit kring alt landið hava ein støðugt vaksandi stættarmun millum rík og fátæk, ein upplivir úti millum manna.

Tað er avgerðandi neyðugt at finna saman við teimum, ein hevur nakað til felags við, og læra av lívsroyndum hjá hvørjum øðrum, og minst til, at samanhald gevur styrki.

Tað er avgerðandi neyðugt at arbeiða fram ímóti at blíva sjálvstøðugur og óheftur av arbeiðsgevara og arbeiðstakara og ikki minst av øllum teimum, ein skyldar pening.

Tað er á slíkan hótt, at ein sleppur undan øllum skaðiligum valdsmisbrúki, og hvørs hesi vælbjargaðu ikki hava loyvi til at fremja slíkt.

Tað er ikki mín samfelags uppgáva at syrgja fyri, at allar fyritøkur, stovnar og virkir kring alt landið fáa dagført sínar skipanir, mannagongdir og tænastur mótvegis viðurskiftafólki.

Tað er rættiliga strævið og tungt at hava fingist við slíkt í dagliga stríðnum við kravi um at fáa broytingar í hesum.

Tað skal tí verða mín áheitan til allar vanligar føroyingar, stuðlið tí heldur smáu keypmonnum/kvinnum í kapping móti teimum vælbjargaðu

**Hans Birgir Hansen**

# Løgtingshúsið

Nú um dagarnar er undirskriftsavnan, ið mótmæla niðurtøku av gomlu løgtingshúsunum. Eg taki undir við hesum

Døgurðin verður ikki betri av at koyra ein størri tosk í ein lítlan pott.

Eg hoyri fyri mær løgtingsformannin upp í slag siga: betri umstøður, betri arbeiðsumstøður, fulla løn til tingmennirnar, so teir vera verandi í tinginum. Altsaman ógvusligt og gott.

Ein øvugt verð verður skapt. Løn í tinginum og samsýning á arbeiðsmarknaðinum. Somu arbeiðstíð, men meiri í løn. Farloyviskipanin verður ein standardblanket á nýggju løgtingsskrivstovuni, og varamennirnir vera dagligir gestir í húsinum. Eitt nærdemokrati í blóma, øll eru viðkomandi. Eitt nýtt hús, ein nýggj tjóð.

Men hví skal miðbýurin í Havn fyllast við einum yvirdimensioneraðum rammubúri, klakkað við politiskum lokalpatriotum. Býurin tolir ikki fleiri trøll, um man skal hóma skapilsi »Verðins nalvi«. Tað er og verður ein lappaloysn, ið ikki tænir nøkrum og sum ongantíð verður liðug. Vit vita jú, at byggikostnaðurin næstan altíð verður tað dupulta av tí ásetta. Ónøgdin við hesa vána heildarloysn fer at minnast langt inn í framtíðuna.

Tá nú alt skal vera av nýggjum, løgtingshús, grundlóg o.s.fr. ger tað ordiliga og frá grundini av.

Hvat við einum nýggjum tingstaði? og lat tann blettin í miðbýnum hava frið, so vit kunnu hava felagssang á ólavsøku, jólatræ, grækarismessu, flagdagshald, 1. mai, ja altsaman uttan trongsul, barnakarmar og luktandi dunnuhyljar.

Hví ikki eitt nýtt Tjóðartún á horninum av sjálvastu Jóannesar Patursonar Gøtu og Á Frælsinum? Bygt í fleiri stigum og eftir økonomiskum umstøðum.

Her er frítt lendi, her er kirkja, her er vøkstur, her er ljós og opið. Her er av røttum ein rennandi á, ið kann leiðast gjøgnum nýggja tinghúsið og tutla tingmonnunum nakrar sannleikar oman úr fjøllunum.

Her verður atkomuligt í allar mátar, tætt við nýggja ringvegin og alíkavæl í býnum. Eingir dragandi bátahyljar ella angandi pylsuvognar.
Løgtingslimirnir vera til arbeiðis í tinginum!

Tá virðislønir fyri slíkar projektkappingar líkasum alíkavæl fara av landinum, kundi ein norðurlendsk hugskotskapping givið nýggju tjóðini tiltrongdan íblástur.

**Vinarliga B eygleiðari**

PS. Vinnandi projektið hóskar væl sum relieff til grótbrotið á Skálatrøð